

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 03 - 2012

# Bretar leita eftir olju í Jyllandi

Eitt bretskt oljufelag fer nú at vita, um olja er at finna í jørðini nærhendis býnum Hedensted í Jyllandi. Tað, sum ger økið við Hedensted so áhugavert fyri oljufólk, er, at her er eitt elligamalt koralriv, og tað kann vera ein fráboðan um, at olja er har. Í hvussu er heldur bretska oljufelagið Tesla útlitini vera so mikið góð, at felagið hevur gjørt av at fara at kanna undirgrundina millum Ringkøbing og Horsens nærri. -Koralrivið hevur ligið har í mong, mong ár. Ígjøgnum nakrar milliónir ár eru koraldýrini deyð og eru sokkin niður á havbotnin. Síaðni hevur lendið forskotið seg eitt sindur, so tað er komið undir trýst, avleiðingin av tí er olja og gass, sigur Hans Koch, verkætlanarleiðari, við danska útvarpið. Kanningarnar hjá Tesla byrja í næstu viku.

